# Tá mundi tú stolið mítt hjarta

**Tað er bara ein Eivør. Um vikuskiftið lænti hon hjørtini hjá áhoyrarum í Norðurlandahúsinum og Mentanarhúsinum við góðari hjálp frá einum nýggjum íslendskum bólki, felagskórinum Gøta/Leirvík og yndisligum Lucia-gentum**

UMMÆLI
*Ingi Rasmussen*

»Hon stendur onki aftan fyri Sissel Kirkjebø.«

»Hon minnir meg um Anisette úr Savage Rose.«

Tvær so ymiskar útsagnir aftaná jólakonsertina leygarkvøldið í Norðurlandahúsinum vitna um, at her er talan um ein sangara, sum spennir ótrúliga víða. Vit vóru og lýddu á Eivør Pálsdóttir, og sunnukvøldið stóð hon á pallinum í Mentanarhúsinum í Fuglafirði.

Upplivilsið var stórt, fjølbroytt og máttmikið. Eivør var bæði ein vakur eingil og ein dragandi dís, og vit fingu høvi bæði at uppliva jólafrið og hulduløg.



*Eivør Pálsdóttir við gittaranum fekk gott undirspæl frá Birgiri Bragasyni á kontrabassi og hinum íslendsku tónleikarunum, sum týðiliga nýttu at spæla saman við føroyska stórtalentinum*

*Mynd: Tom Laursen*

### Nýggjur bólkur

Eivør Pálsdóttir var fyri fyrstu ferð saman við sínum nýggja íslendska bólki á palli í Føroyum. Birgir Bragason á kontrabassi, Eyvarð Lárusson á gittara og Pétur Grétarsson á trummum hóskaðu sera væl saman við Eivør, og teir skaptu ein tryggan gróðrarbotn fyri tí sjáldsama huglagnum, sum Eivør meistarliga manar fram.

Sjálv skráin var ein spennandi samanseting. Jólaløg, traditionellir sálmar og egin løg vóru útsett í sjáldsamar og øðrvísi tulkingar. Onkuntíð yndisligt, stundum sorgblítt og aðrar tíðir dragandi demoniskt.

Eivør fekk eisini víst, at hon dugir betur enn hampiligt við sínum guitara og ger løg, sum fáa hárini at reisast. Ella er tað bara tí, at øll løg verða spennandi, tá hon ber tey fram.

### Kanska ein dag

Persónliga dámdi mær serliga væl framførsluna av einum nýggjum lagi hjá Eivør, sum kallast »Kanska ein dag«. Tað var so einkult og sjálvsagt, og kortini kom tað so óvart á.

Felagskórið Gøta/Leirvík bakkaði Eivør upp í tveimum kendum jólaløgum, Pie Jesus og Halga nátt. Kórið kom væl frá sínari framførslu, sum var trygg og dempað. Í Pie Jesu fór Eivør upp um tað høga C-ið, men tað var so inniligt og kensluborið, at onki glas í Norðurlandahúsinum kundi droymt um at brotnað.

Tað var eisini ein flott finala, tá ein riðil av smágentum í hvítum kjólum við livandi ljósum komu gangandi inn eftir gólvinum og tóku undir at syngja Santa Lucia. Eitt rørandi punktum fyri eini konsert á himmalskum støði.

### Bara Eivør

Fólk høvdu sjálvandi ikki fingið nokk og kravdu meira.

Íslendska bandið kom ikki innaftur, men Eivør og gittarin bjóðaðu seg fram. Hon sang ein hálvlidnan sang, ið bygdi á orðini »Tá mundi tú stolið mítt hjarta«, sum hon hevði sitið við kvøldini fyri.

Tað sigur ikki so lítið um hennara sjálvsálit, evni og innara frið, at Eivør hóast sín unga aldur torir at kasta seg út í ein hálvlidnan tekst uttan eitt endaligt lag – og sleppur væl frá tí. Tað er, sum hevur hon samband við okkurt yvirnáttúrligt, men kortini er hon so púra náttúrlig, tá hon tekur okkum langt inn í sín tónleik.

Tað er skeivt beinleiðis at samanbera hana við nakran annan. Eivør er bara Eivør. Hon kann vera Kirkjebø, Anisette og BjÖrk. Men bara Eivør er Eivør.

Í mikudagsblaðnum verður reportasja frá konsertini í Mentanarhúsinum.

Leygarkvøldið mundi hon stolið mítt hjarta.

# Hanus Kamban fegnast um viðurkenning

**Rithøvundurin Hanus Kamban er innstillaður til bókmentavirðirsløn Norðurlandaráðsins. Hann væntar sær ikki heiðurin, men fegnast og tekur taðsum eina viðurkenning av sínum arbeiði**

VIRÐISLØN
*Ingi Rasmussen*

– Tað er stuttligt og kennist nøktandi.

Tað sigur Hanus Kamban, rithøvundur, sum er føroyska boðið upp á bókmentavirðislønina hjá Norðurlandaráðnum fyri 2003. Hann er innstillaður fyri stuttsøgusavnið Pílagrímar, sum kom út í 2001. Hóast Hanus ikki væntar sær heiðurin, so er hann sera glaður fyri at verða innstillaður.

– Tað er onkursvegna ein viðurkenning av tí arbeiði, sum tú gerst. Tá tú arbeiðir við einum verki, sum í hesum føri var Pílagrímar, kennir tú sjálvur á tær, um tað er væl frágingið. Men tað kennist sjálvandi betur, tá onkur annar, sum tú ikki kennir, gevur tær eina viðurkenning, sigur Hanus Kamban.

### Høg krøv

Úr hinum Norðurlondunum eru innstillað Per Højholt og Morten Søndergaard úr Danmark, Pirjo Hassinen og Kjell Westö úr Finnlandi, Alfrun Gunnlaugsdóttir og Johann Hjalmarsson úr Íslandi, Liv Køltzow og Jørgen Norheim úr Noregi og Stewe Claeson og Eva Ström úr Svøríki.

Bókmentavirðislønin verður latin fyri eitt fagurbókmentaligt verk, sum er skrivað á einum av teimum norðurlendsku málunum. Tað kann vera ein skaldsøga, eitt yrkingasavn, eitt stuttsøgusavn ella eitt essaysavn. Verkið skal lúka høg bókmentalig og listarlig krøv.

Ein norðurlendsk nevnd velur, hvør skal fáa heiðurin. Endamálið við prísinum er at økja um áhugan og kunnleikan fyri bókmentunum, mentan og máli hjá grannum í Norði.

### Tveir føroyingar

William Heinesen og Rói Patursson eru einastu føroyingar, sum áður hava megnað at fáa virðislønina, tá til stykkist kom. Nú Sunnleif Rasmussen fekk tónleikavirðislønina í ár, ivast fólk eisini í, um ein føroyingur hevur nakran kjans at fáa bókmentavirðislønina eisini. Hanus Kamban verður so ikki vónsvikin, um onkur annar fær heiðurin og harvið tær 350.000 krónurnar, tá vinnarin verður avdúkaður 21. februar 2003.

– Tað er fullkomiliga óvist, hvør fær heiðurin, tá av tornar. Tað havi eg ongar tankar gjørt mær um. Eg eri bara fegin um at ta viðurkenning, sum tað er at vera innstillaður, sigur Hanus Kamban.

Leygardagin hava vit størri viðtal við Hanus Kamban í sambandi við, at hann letur eitt nýtt stuttsøgusavn úr hondum í vikuni.



# Gásadalstunnilin skotin ígjøgnum áðrenn jól

**Arbeitt verður í tveimum skiftum, sjey dagar um vikuna. – Vit miða ímóti at koma ígjøgnum áðrenn jól, sigur Oyvindur Brimnes, landsverkfrøðingur**

GÁSADALSTUNNILIN
*Jón Brian Hvidtfeldt*

Gongst sum ætlað, so verður nýggi Gásadalstunnilin skotin ígjøgnum áðrenn jól. Í eina tíð hava teir 10-12 menninir hjá Landsverkfrøðinginum arbeitt í tveimum skiftum umframt at arbeitt hevur verið um vikuskiftið.

Oyvindur Brimnes, landsverkfrøðingum, sigur, at tey miða ímóti at koma ígjøgnum áðrenn jól. Dagblaðið skrivar, at tunnilin verður skotin ígjøgnum 18.desember, men so bjartskygdur er landsverkfrøðingurin kortini ikki.

- Vit vóna at koma ígjøgnum áðrenn jól, men tað verður neyvan fyrr enn 20.desember – møguliga ikki fyrr enn 23.desember, sigur Oyvindur Brimnes.

Oyvindur Brimnes vísir á, at av tí at tey bara bora øðrumegin frá, er truplari at meta neyvt um, hvussu langa tíð arbeiðið fer at taka, sammett við um borað varð frá báðum síðum samtíðis. Serliga kann vera trupult at meta um teir seinastu metrarnar, áðrenn komið verður ígjøgnum.



*Seinasta skotið í tunnlinum til Gásadals verður væntandi latið av áðrenn jól, helst ein av døgunum 20.-23. desember, metir Oyvindur Brimnes, landsverkfrøðingur. Men rúm tíð fer helst at ganga, áðrenn tunnilin kann takast í nýtslu, tí bara tríggjar milliónir eru settar av til arbeiðið næsta ár.*

### Óviss tíðarætlan

Sum er dugur landsverkfrøðingurin ikki at siga, nær tunnilin til Gásadals verður endaliga liðugur. Tað veldst politiska viljan, og í síðsta enda, hvussu nógvir pengar verða settir av til endamálið.

- Sambært upprunaligu langtíðarætlanini skuldu 8-10 milliónir krónur setast av á fíggjarlógini til Gásadalstunnilin næsta ár, men tað seinasta eg veit um, er at tríggjar milliónir vera settar av. Einasta vit kunnu gera, er at arbeiða út frá tí játtan, vit fáa, sigur Oyvindur Brimnes.

Hóast tunnilin verður skotin ígjøgnum áðrenn jól, so manglar framvegis nógv arbeiði, áðrenn hann kann takast í nýtslu. Oyvindur Brimnes vísir á, at verða tríggjar milliónir játtaðar til arbeiðið næsta ár, so røkka tær til at gera tunnilin tryggan, at gera vendipláss øðrumegin umframt okkurt smávegis afturat. Men talan verður kortini bara um arbeiðsveg, og tí verður ikki talan at lata tunnilin upp fyri almennari ferðslu.

Oyvindur Brimnes sigur, at tað tó hevur verið uppá tal at loyva ávísari ferðslu gjøgnum tunnilin, m.a. so at vøra og postur kann koma til Gásadals hvønn dag, og møguliga verður uppá tal, at loyva bygdarfólki at nýta tunnilin. Men hetta skal í øllum føri gerast undir strangum eftirliti, og eisini verður neyðugt at hava bumm fyri tunnilsmunnan, so ferðslan gjøgnum tunnilin kann tálmast, sigur Oyvindur Brimnes.

Landsverkfrøðingurin sigur, at tað verður ikki fyrr enn í maj ella juni mánað næsta ár, at ávís ferðsla verður loyvd í Gásadalstunnlinum.

Umframt sjálvt tunnilsarbeiðið skal vegur gerast oman í bygdina. Oyvindur Brimnes sigur, at sum tað sær út í løtuni verður hetta arbeiði boðið út í 2004.

# Siglingin um Vestmannasund steðgað við lóg

**Nú undirsjóvartunnilin verður tikin í nýtslu, hevur Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í samferðslumálum, lagt uppskot fyri løgtingið um at steðga siglingini um Vestmannasund. Í hesum sambandi skal Vestmanna Kommuna hava tríggjar milliónir krónur í endurgjaldi, fyri mist havnagjald**

LØGTING
*Jón Brian Hvidtfeldt*

Mikudagin, ella dagin eftir at fasta sambandið um Vestmannasund er alment tikið í nýtslu, skal løgtingið viðgera eitt uppskot frá Bjarna Djurholm um at broyta lógina um fólka- og farmaflutning.

Broytingaruppskotið fevnir í stuttum um at strika leiðina »Vestmanna – Oyragjógv« av yvirlitinum yvir tær leiðir, ið Strandferðslan hevur skyldu at røkja. Og við hesum fer siglingin um Vestmannasund so endaliga í søguna. Strandferðslan hevur longu boðað frá, at síðsti túrur um sundið verður sigldur um middagsleitið týsdagin, beint áðrenn tunnilin verður tikin í nýtslu.

Farleiðin um Vestmannasund hevur higartil givið eitt lítið yvirskot, umleið 300.000 krónur, til Strandferðsluna. Tá komið var til hálvan november hevði Strandferðslan flutt umleið 360.000 fólk og 98.000 bilar aftur og fram um Vestmannasund, og tá má havast í huga, skipini lógu frá 18.apríl til 15.maj vegna verkfall.

Men nú koyrandi verður undir sundið er neyvan sannlíkt, at tað hevði borið til at varðveitt nógvu ferðsluna við Ternuni, og harvið yvirskotið í kassan hjá Strandferðsluni.

### 3 mió. í endurgjaldi

Nú siglingin verður niðurløgd missir Vestmanna Kommuna inntøkur frá havnagjaldinum, og tí skal landið gjalda endurgjald til kommununa. Kommunan fær endurgjald, ið svarar til havnagjaldið í fimm ár, grundað á miðal árliga havnagjaldið seinastu trý árini. Eftir hesum skal Vestmanna Kommuna hava umleið tríggjar milliónir krónur í endurgjaldi frá landinum. Peningurin verður rindaður í einum.

# Nýggj flogruta til eysturoyingar og norðoyingar

**Nú Vágatunnilin verður tikin í nýtslu hækkar Strandferðslan um tænastustøðið, og bjóðar millum annað eina nýggja flogrutu til fólk í Eysturoynni og Norðoyggjum. Samtíðis hevur Strandferðslan megnað at varðveita somu ferðaseðlaprísir, hóast stovnurin skal gjalda tvær milliónir árliga til P/F Vágatunnilin**

SAMFERÐSLA
*Jón Brian Hvidtfeldt*

Nú koyrandi verður undir Vestmannasund, kunnger Strandferðslan nýggja ferðaætlan vestur í Vágar. Fasta sambandið um sundið styttir munandi um tíðina, tað tekur at koyra úr Vágum inn á meginøkið. Og eisini verður sambandið inn í Eysturoynna munandi betri, tí nú verður ein flogruta at koyra inn í Eysturoynna og til Leirvíkar, so eisini norðoyingar fara at sleppa skjótari og lættari vestur í Vágar.

- Eg meti, at vit við hesi ferðaætlanini hava megnað at lyft tænastustøðið munandi, sigur Pól Jákup Thomsen, fólkaflutningsleiðari hjá Strandferðsluni. Hann vísir á, at nú koyrandi verður heilt vestur á flogvøllin, styttir tað munandi um tíðina, tað fer at taka at koyra vestur.

### Somu prísir

Hóast Strandferðslan skal gjalda umleið tvær milliónir um árið til P/F Vágatunnilin, so verður tað ikki dýrari at koyra við bussi til og úr Vágum. Ein ferðaseðil úr Havn vestur í Vágar fer framvegis at kosta 100 krónir eins og eitt mánaðarkort framvegis fer at kosta 1050 krónur.

- Vit vænta, at nógv fólk framvegis fara at ferðast aftur og fram, t.d. millum Vágar og Havnina til arbeiðis ella í skúla, sigur Pól Jákup Thomsen. Hann vísir á, at túrurin við bussi bara fer at taka trý korter, so fólk tørva ikki at fara so tíðliga frá húsum, fyri at vera til arbeiðis ella í skúla í Havn klokkan átta um morgunin.

Aðrastaðni í blaðnum lýsir Strandferðslan við nýggju ferðaætlanini, ið tey hava valt at nevna fyri eina royndarferðaætlan. Pól Jákup Thomsen sigur, at møguliga verða onkrar tillagingar gjørdar seinni, vísir tað seg at vera rættast.